UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment

# Reglugerð

# um

# stuðul til útbygging av landstreymi til skip við bryggju

## Endamál

**§ 1.** Reglugerðin ásetir treytir fyri stuðulsveiting til landsstreym á konto 18.37.4.09. Landsstreymsverkætlanir, løgustuðul á fíggjarlógini.

*Stk. 2.* Endamálið við játtanini er at stuðla verkætlanum, sum:

1) menna útbygging og útbreiðslu av landstreymi í kommunalum havnum o.t.,
2) fremja orku- og veðurlagspolitikk Føroya í verki, og
3) minka um ljóðdálking frá skipum, sum liggja við bryggja.

## Stuðul

**§ 2.** Kommunur, kommunalar havnir og aðrar havnir, kunnu søkja Umhvørvismálaráðið um stuðul til útbygging av landstreymi til skip við bryggju.

**§ 3.** Stuðulin kann í mesta lagi vera 50% av samlaða verkætlanarkostnaðinum.

## Umsóknartreytir

**§ 4.** Í umsóknini um stuðul, skulu kommunan og havnin lata hesar upplýsingar:

1) hvat slag av skipum koma í havn, t.e. fiskiskip, bingjuskip, ferðamannaskip o.tíl.,
2) gera eitt yvirlit yvir, hvussu leingi ymisku skipini ella skipabólkarnir í meðal liggja í havn,
3) meta um tørvin á landstreymi til ymisku skipabólkarnar,
4) meta um virksemið og skipaferðslan fer at minka ella vaksa komandi árini,
5) eitt yvirlit yvir, hvørjar havnaútbyggingar eru ávegis í kommununi,
6) eina lýsing av elnetinum í økinum og mettan tørv á netútbygging fyri at kunna útbyggja og veita landstreym til skip. Henda lýsing skal váttast av SEV,
7) eina tøkniliga lýsing av, hvat slag av landstreymi ætlanin er at veita og hvørjir skipabólkar, roknað verður við kunnu taka ímóti landstreyminum, og
8) tíðar- og kostnaðarætlan fyri verkætlanina.

## Útgjald

**§ 5**. Stuðulin verður útgoldin, tá Umhvørvismálaráðið hevur móttikið grannskoðaðan verkætlanarroknskap.

*Stk. 2.* Útgjald kann eisini verða goldið fyri ávegis verkætlanarroknskapir.

Gongin 7 • FO-100 Tórshavn
Tel. (+298) 35 87 00 • umhvorvi@umhvorvi.fo • www.umhvorvi.fo

*Stk. 3.* Verkætlanarroknskapurin skal lúka treytirnar í §§ 21-22 í kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.
*Stk. 4.* Tá verkætlanin er liðug, skal roknskapur latast Umhvørvismálaráðnum, saman við frágreiðing um úrslitið av verkætlanini.

**Frágreiðing**

**§ 6.** Stuðulsmóttakarar skulu lata Umhvørvismálaráðnum eina verkliga og tøkniliga frágreiðing um verkætlanina. Frágreiðingin skal í minsta lagi lýsa:
1) um komið er á mál við verkætlanini ella nær roknast má við, at komið verður á mál,
2) ein eftirmeting av, hvat hevur eydnast væl, minni væl og hvørjir snávingarsteinar hava verið,
3) hvat eyðkennir valdu tøkniligu loysnina, fyrimunir og vansar við henni, og
4) hvussu samstarvið við onnur hevur hildnast.
*Stk. 2.* Ein samandráttur á í mesta lagi tvær A4-síður skal latast við, sum er egnað til at lýsa verkætlanina fyri almenninginum. Samandrátturin verður gjørdur atkomuligur hjá almenninginum.

**Gildiskoma**

**§ 6.** Henda reglugerð kemur í gildi 15. oktober 2025.

**Umhvørvismálaráðið, 15. oktober 2025**

Margit Stórá
landsstýriskvinna

Pól Egholm